# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2019



## Á HVØNN HÁTT ER DREPARASNIGILIN EITT SKAÐADJÓR?




Granskarar: 8.flokkur í Skúlanum á Argjahamri

# INNGANGUR

Vit í 8. flokki í Skúlanum á Argjahamri, hava valt at granska dreparasniglar. Okkara undranarspurningur er:

## Á hvønn hátt er dreparasniglar eitt skaðadjór?

Fyri at vit kunnu svara okkara undranarspurning, skulu vit vita hvat ein dreparasnigil er, hvat hann ger, og fáa hagtøl. Tí fara vit at hava eina samrøðu við Jens-Kjeld Jensen, og vit fara at spyrja fólk um teirra upplivingar við dreparasniglum.

Vit hava arbeitt hvønn fríggjadag í ein mánaða, og halda tað hava verið sera spennandi.

Lærari:

Mariann Súsanna Poulsen: mariann.susanna.poulsen@skulin.fo

Sara Leonhard Dydvald: sara.leonhard.dydvad@skulin.fo

Luttakarar:

Brynhild S. Meitil, Joy Hjaltalin, Mariann R. Rasmussen, Rannvá Lenvig, Ria Danielsen, Sára Skaalum, Sitri Petersen og Tórdis Erlingsdóttir

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD

**1. Hetta undrast vit á**

Á hvønn hátt er dreparasnigilin eitt skaðadjór?

**2. Hví er tað so?**

-Okkara hypnotesa

**3. Legg eina ætlan**

Møgulig undirpunkt

**4.Savna upplýsingar**

- Samrøða við Jens Kjeld – Lívfrøðingur

- Spurnarkanning – Lærarnir

- Samrøða – Umhvørvisstovuna

- Lisið á netinum – Keldulistið niðast

**5. Hetta eru vit komin fram til**

- Okkara niðurstøða

**6. Sig øðrum frá**

- Framløgu

**7. Fylgiskjøl**

- Stabbamynd

- Kladdir

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Her eru nakrir spurningar ið vit undrast á um dreparasniglar. Undranapurningarnir fara vit seinni at royna at fáa so gott svar á sum gjørligt.



- Hvat er ein dreparasnigil?
- Hvussu ávirkar dreparasnigilin havan hjá fólki?
- Hvussu sær ein dreparasnigil út?
- Hvat doyggja dreparasniglar av?

# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Dreparasniglar er eitt djór sum nógv fólk irriterast á. Eitt eyðkenni fyri dreparasnigilin er útsjóndin, hann er stórur, feitur og oftast myrkur í litið. Tað verður sagt at hann er eitt skaðadjór, men vit ætla at finna útav um tað veruliga er satt. Hettar eru hypnotesurnar vit eru komnar fram til:

Vit halda at dreparasniglar eru eitt skaðadjór, tí at:

1. Teir eru skaðiligir fyri planturnar og annað grønt.
2. Teir drepa tey djórini, ið eru góð fyri planturnar.
3. Teir eru irriterandi fyri fólk.

## 2.1 HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL Í HYPOTESU 1.

Vit eru komin fram til at dreparasnigilin er eitt skaðadjór, tí at hann bara etur frískar og livandi plantur. So um man roynur at fáa sær eina grøna framtíð og hevur hug at dyrka okkurt úti í havanum, so er dreparasnigilin ein stór avbjóðing.



## 2.2 HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL Í HYPOTESU 2.

Reyðmaðkurin er týdningarmikil og er góður fyri moldina og plantur, tí at hann hjálpur rótini at fáa luft og vatn. Dreparasnigilin drepur reyðmaðkin. Reyðmaðkurin er við at útdoyggja, so tað snýr seg um at sleppa av við dreparasnigilin skjótast gjørligt.

## 2.3 HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL Í HYPOTESU 3.

Vit eru komin fram til at dreparasniglar kunnu verða rættliga irriterandi fyri fólk.
Fyrst og fremst eru teir sera andstyggiligir og tað er ótespiligt at finna teir á garðinum.
Eisini er dreparasniglar sera keðiligir fyri planturnar hjá fólkum, tí hann etur allar tær frísku og grøn u planturnar í havanum.
Ein trupulleiki, sum er nakað stórur fyri fólk, ið hava hund, er
at dreparasniglar seta seg fastan í hári á hundum, tá ið hundurin fer út í havan.

# 3. LEGG EINA ÆTLAN

Fyri at fáa svar uppá hví dreparasnigilin verður bólkaður undir skaðadjór...

1. Ætla vit at spyrja lærarir runt á skúlanum, um tey hava dreparasniglar í teirra hava, og um tey hava trupuleikar við teimum.

2. Fyri at finna útav hvussu vit kunnu sleppa av við teir, fara vit út at finna dreparasniglar og kanna hvørjum teir doyggja av.

3. Fyri at finna útav hví dreparasniglar er eitt skaðadjór, fara vit at gera samrøðu við ein lívfrøðing.

# 4. SAVNA UPPLÝSINGAR

## SAMRØÐA VIÐ JENS-KJELD:

Jens-Kjeld er lívfrøðingurin ið granskar mest í Føroyum. Tí hugsað vit at hann mann vita nógv um dreparasniglar.

Okkara hypnotesa er, at allir sniglar eru skaðiligir fyri plantur, og tí skulu teir útruddast.



Jens Kjeld greiðir okkum frá, at tað als ikki eru allir sniglar í eru skaðiligir, men við tíðini eru dreparasniglar og brúnsniglar farnir at líkjast so nógv, at man ikki kennir mun. Tað sum ger tað týdningarmikið at drepa dreparasniglarnir er, at hann *bara* etur fřískar plantur. Brúnsnigilin, ið ikki er skaðiligur, skal man ikki drepa, tí hann er nemliga góður fyri moldina, á tann hátt at hann etur deyðar plantur og gevur góða mold út aftur. Ein loysn til tann trupulleikan er Leopardsniglar, tí at teir hava eina tungu sum minnur um sandpapír og teir eta dreparasniglar.







Tekna av Rannvu

Sjálvt serfrøðingar taka feil av dreparasniglum og brúnsniglum. Men har er tó 3 mátar ið man kann finna útav hvør er hvør:

1. Tú kann hyggja at innara gøgnunum á einum dreparasnigli
2. Um tú finnur 2-3 í havanum er tað sikkurt ein brúnsnigil. Men um tú finnur 20 er tað heilt sikkurt at tað er ein dreparasnigil
3. Dreparasnigilin etur *bara* frískar plantur, og hin deyðar

Leggjast kann afturat, at Jens-Kjeld viðmælir, at vit í Føroyum gera eina lóg, har vit banna innflutningi av plantum í Føroyum, hetta fyri at tryggja okkum, at vit ikki fáa fleiri skaðadjór til Føroyar

## EKSPERIMENT VIÐ DREPARASNIGLAR – HVØRJUM TEIR DOYGGJA AV

Vit hava verið úti og leita eftir dreparasniglum, men tað gekk ikki so væl, tí at teir eru sera ringir at finna hesa ártíð. Grundin til at teir ikki eru úti, er at teir eru í vetrardvala og koma ikki fram fyrr enn tað verður 10 gradir. So tí kunnu vit ikki gera kanningar við dreparasniglum og finna útav hvørjum teir doyggja av. Men vit vita, at teir doyggja av salti, tí at saltið trekkir alla vætuna til sín og turkar allan dreparasnigilin upp.

## SPURNARKANNING VIÐ LÆRARAR Á SKÚLANUM Á

Vit hava spurt lærarir á skúlanum, tí teir allarhelst hava ein garð, og hava óivað royndir við sniglum.

Vit hava spurt teir hesar spurningar:

- Veist tú hvat ein dreparasnigil er?
- Um so er, eru teir í garðinum hjá tær?
- Ávirka teir teg?
- Veist tú hvussu man drepur teir?
- Um ja, hvussu?

Á fylgiskalinum sum tú sært niðast á síðu 11, kanst tú síggja eina stabbamynd yvir vitanina hjá lærarir um dreparasniglar. Teir flestu lærarnir vita, hvussu man sleppur av við dreparasniglar, men dreparasniglar ávirka ikki teir flestu lærarnir.

Vit høvdu allarhelst hildið, at dreparasniglar ávirkaðu fólk meira enn kanningarnar vístu.

Tá ið vit spurdu um dreparasniglar ávirka viðkomandi vóru tað fá, sum blivu ávirka.
Á tann hátt teir ávirkaðu viðkomandi var at dreparasniglar:

- ”Eta planturnar”
- ”Sita fastir á hárinum á hundinum, tá ið hann fer út í havan”
- ”Teir eru mega vemmiligir”

Sum man sær á stabbamyndini, Her eru nøkur dømi:

- ”Gera eina fellu, við at leggja eina øl fløsku út í havan”
- ”Keypa dreparasniglagift”
- ”Traðka á teir”
- ”Klippa teir í helt”
- ”Koyra salt á teir”

# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Aftaná hendan mánan við nógvum arbeiði eru vit komin fram til eina niðurstøðu. Vit hava savna upplýsingar á bæði netinum, kanningar og samrøður:



Á hvønn hátt er dreparasnigilin eitt skaðadjór?

Dreparasnigilin er ikki eitt skaðadjór í Suður Evropa, tí har er hann langt niðri í føðiketuni, so hann má bara verja seg frá øðrum.

Her í Føroyum er tað bara Leopard snigilin ið etur hann, so hann kann gera sum hann vil.

Dreparasnigilin etur BARA friskar plantur, so hann oyðileggur havar og eplaveltur.

Hann etur eisini reyðmaðkin, og hann er týdningarmikil partur av plantuvøkstrinum.

# 6. SIG ØÐRUM FRÁ

Aftaná at hava funnið vitan um dreparasniglar, mangla vit bara at siga øðrum frá. Fyri at gera tað, ætla vit at gera eina powerpoint framløgu framman fyri flokkinum, og deila okkara vitan við tey um dreparasniglarnar. Tað er týdningarmikið at siga øðrum frá so vit øll kunnu vera tilvitaði um hendan snigil. Tí tað er viktigt at útrudda hann.

# 7. FYLGISKJØL

Her eru spurningarnir vit spurdu Jens-Kjeld um í gjøgnum telefon.


Spurningar til Jens Kjeld jensen

- Hvat er ein dreparasnigil?
- Er nakað stað í Føroyum har hann ikki heldur til?
- Hvussu ávirka teir planturnar?
- Eru nógvir av teimum í Fø?
- (Umjá) Eru teir ein trupulleiki?
- Hvussu og nær komu teir til Fø?
- Hvussu er tað ein trupulleiki at teir eru farnir at líkjast øðrum?
- Hví er tað viktigt vit drepa teir og ikki aðrir sniglar?
- Hvat doyggja teir av?
- Hví er tað at fólk allar helst ikki vilja hava teir í havanum?
- Minkar ella veksur talið á teimum?
- Hevur tú nakað at leggja afturat?

Her er spurnarkanningin vit hava gjørt við lærararnir á Skúlanum á Argjahamri:






Hettar eru spurningarnir vit spurdu lærararnar um:


1. Veist tú hvat ein dreparasnigil er?
2. Um so, eru teir í havanum hjá tær?
3. Ávirka teir teg?
4. Veist tú hvussu man drepur teir?
5. Um ja hvussu?

Keldulisti:


- https://www.google.com/search?q=dr%C3%A6bersnegle+bolius&rlz=1C1GCEU_daFO821FO821&oq=dr%C3%A6bersnegle+bolius&aqs=chrome..69i57.12983j0j7&sourceid=chrome&ie=UTF-8
- http://www.jenskjeld.info/
- https://www.gransking.fo/fo/tilfeingi/arsins-vitanarfrodu-2018-19/